LANDSROYND
MARS 2011
Føroyskt, lesa og skilja

4. FLOKKUR

# FØROYSKT

45 minuttir



| Navn: | Flokkur: |
| --- | --- |
| Skúli: | Lærari: |

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Byrjað verður við fyrstu uppgávu á síðu 2, og síðani verða uppgávurnar loystar í teirri raðfylgju, tær koma. Tú kanst skriva við blýanti.

## Set x við røttu myndina

| lundi |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| bilur |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| toskur |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| oyggj |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| súrepli |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| telefon |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| giraffur |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| appilsin |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| lagkaka |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

| fuglur |  |  |  |  |
|---|---|---|---|---|
| | ☐ | ☐ | ☐ | ☐ |

**Les setningarnar á síðuni og skriva rætt tal við myndirnar á síðu 5!**

1. Okkara hundur eitur Snar

2. Vit eru 22 næmingar í okkara flokki

3. Á jólum hava vit jólatræ

4. Tá ið eg fylli, flagga vit

5. Vit eiga ein bát

6. Eg fekk ein bólt í føðingardagsgávu

7. Mær dámar væl at svimja

8. Í fríkorterunum spæla vit í skúlagarðinum

9. Eg súkkli ofta í skúla

10. Omma og abbi hava nógvan seyð



3



















**Les setningarnar á síðuni og skriva rætt tal við myndirnar á síðu 7!**

1. Eg gjørdi pitsu til alla familjuna í gjár
2. Okkara fitta ketta hevur lagt
3. Eg fekk eina banan frá beiggja mínum
4. Pápi mín eitur Hanus
5. Mamma mín arbeiðir á Landssjúkrahúsinum
6. Eg savni fótbóltskort
7. Mær dámar so væl at lesa
8. Eg keypti seks súrepli í gjár
9. Um summarið henti eg ofta sóljur
10. Tað var so nógvur kavi í vetur





















## Set x við røttu myndina

1. Gentan er ljóshærd
   Hon hevur fléttur
   Hon er í brillum
   Hon hevur frunt



2. Drongurin er skóm
   Hann er í puntutari troyggju
   Hann hevur ein bólt undir arminum
   Hann er í keppi



3. Fuglurin er svartur og hvítur
Hann er saman við øðrum fuglum
Hann hevur long bein
Hann hevur spískt nev



4. Djórið hevur langan hala
Tað liggur í grasinum
Tað er strípult
Tað er uttast til høgru



5. Luturin kann verða brúktur til at skriva við
Tú kanst spæla við honum
Luturin verður brúktur bæði í skúlanum og heima
Luturin er tann størsti av hesum



## Myndalesing



Skulin.fo – myndasavn. Myndatakari Heini Nygaard

**Set kross við rætt svar:**

| | Tað síggi eg á myndini | Tað veit eg ikki |
|---|---|---|
| Trý børn eru á myndini | | |
| Gentan er fimm ár | | |
| Her eru tveir dreingir og ein genta | | |
| Tey eru á sandinum á Sandi | | |
| Tey spæla á sandinum | | |
| Gentan er í reyðari blusu | | |
| Drongurin í miðjuni hevur ein spaka í hondini | | |
| Tey eru systkin | | |
| Drongurin í miðjuni er elst | | |
| Nú fara tey at svimja | | |



Skulin.fo - Myndasavn. Myndatakari John Berg

## Set kross við rætt svar:

| | Tað síggi eg á myndini | Tað veit eg ikki |
|---|---|---|
| Drongurin hevur ein hana á økslini | | |
| Drongurin eigur hanan sjálvur | | |
| Drongurin hevur fýra systkin | | |
| Drongurin hevur skúlatasku á bakinum | | |
| Hanin eitur Hvíti | | |
| Drongurin er í húgvu | | |
| Húgvan er blá | | |
| Drongurin býr á Strondum | | |
| Fleiri hús síggjast aftan fyri drongin | | |
| Aftan fyri drongin er ein bilur | | |



Skulin.fo – myndasavn. Myndatakari Heini Nygaard

**Set kross við rætt svar:**

| | Tað síggi eg á myndini | Tað veit eg ikki |
|---|---|---|
| Her er ein genta | | |
| Tað er nógvur kavi | | |
| Gentan er farin út at skreiða | | |
| Mamma og pápi eru úti við gentuni og skreiða | | |
| Gentan hevur føðingardag í dag | | |
| Gentan er í hvítari húgvu | | |
| Hon er í kavadrakt | | |
| Hon er í gummistivlum | | |
| Gentan hevur eina gula sletu | | |
| Hon eigur sletuna sjálv | | |

**Koyr orðini í rættan kassa.**
**Set rætt tal á.**

1. hamari
2. sólja
3. Spania
4. giraffur
5. Hanus
6. Svøríki
7. smæra
8. sag
9. tikari
10. Týskland
11. Annika
12. hundur
13. klípitong
14. Lív
15. Noreg
16. høvil
17. Óli
18. leyva
19. reinfan
20. rósa
21. stólur



| Amboð | Blómur | Djór | Nøvn á fólki | Lond |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | | | 3 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

Eitt orð loypur av. Skriva tað her:____________________________

*Brot úr bókini Pippi fer umborð. Astrid Lindgren hevur skrivað. Turið Sigurðardóttir týddi úr svenskum. (BFL, 1995)*

**Fínir gestir koma til Pippi.**

Eitt summarkvøld sótu Pippi og Tummas og Annika á svalanum[1] hjá Pippi og ótu skógjarðber, sum tey høvdu hentað fyrrapartin sama dag. Kvøldið var yndisligt. Fuglarnir lótu, og blomstrini angaðu og – ja, so jarðberini. Alt var so friðsælt. Børnini ótu, og Annika sat og hugsaði um, hvussu óført tað var, at tað var summar, og hvussu gott tað var, at tey ikki skuldu í skúla aftur enn á sinni. Hvat Pippi hugsaði um, er ikki gott at vita.

-Pippi, nú hevur tú búð her á Villingaváli eitt heilt ár, segði Annika og kroysti armin á Pippi.

-Ja, tíðin gongur, og vit fara at eldast, segði Pippi. Á mikkjalsmessu[2] fylli eg tiggju, og tá man tað besta vera farið afturum.

-Heldur tú, at tú fert at búgva her altíð? spurdi Tummas. Eg meini, til tú verður so stór, at tú kanst vera sjórænari.

-Eingin veit, segði Pippi. Tí eg haldi ikki, at pápi fer at búgva á hasari nekaraoynni altíð. So skjótt sum hann er liðugur at smíða sær nýggjan bát, kemur hann eftir mær.

Tummas og Annika suffaðu. Knappliga rætti Pippi seg upp og sat steyrrøtt[3] á trappuni.

-Hyggið, har kemur hann, segði hon og peikaði móti urtagarðsgrindini[4]. Hon tók urtagarðsgøtuna í trimum lopum. Tummas og Annika himpraðust[5] og gingu spakuliga aftaná og vóru í røttu løtu til at síggja hana heingja seg um hálsin á einum ógvuliga tjúkkum manni við reyðum stubbaðum yvirskeggi og í bláum sjómansbuksum.

-Efraim pápi, rópti Pippi og spjálkaði so nógv við beinunum, har hon hekk um hálsin á honum, at teir stóru skógvarnir duttu av. Efraim pápi, sum tú ert vaksin nógv!

-Pippilotta Viktualia Rulligardina Krusmynta Efraimsdóttir Langsokkur, mítt elskaða barn! Eg ætlaði akkurát at siga, at tú vart so nógv vaksin.

-Eg visti tað, segði Pippi. Tað var tí, eg segði tað, haha!

-Barn mítt, ert tú líka sterk enn?

-Sterkari, segði Pippi. Skulu vit leggja sjómann[6]?

-Gamaní, segði Efraim pápi.

Eitt borð stóð í urtagarðinum, og har settu Pippi og pápi hennara seg at leggja sjómann, meðan Tummas og Annika hugdu at. Tað var bara ein í verðini, sum var líka sterkur sum Pippi, og tað var pápi hennara. Har sótu tey nú og settu á av øllum alvi, men hvørki teirra vann. Til endans skalv armurin á Langsokki skipara eitt sindur, og Pippi segði:

-Tá ið eg verði tiggju ár, vinni eg teg.

Tað helt Efraim pápi eisini.

1 Tey sótu á altanini hjá Pippi.
2 Mikkjalsmessa er 29. september.
3 Pippi sat púra steyrrøtt. Tað merkir, at Pippi sat beint upp og niður – púra stív.
4 Urtagarðs-grindin. Tað er portrið til urtagarðin.
5 Tummas og Annika himpraðust. Tað merkir, at tey ivaðust og vistu ikki rættiliga, um tey skuldu fara aftaná.
6 Gera sjómanstak

**Set kross í rætta puntin**

| | ja | nei |
|---|---|---|
| Pippi, Tummas og Annika sita á svalanum hjá Pippi | | |
| Pippi hevur búð á Villingaváli í eitt hálvt ár. | | |
| Pippi verður níggju á mikkjalsmessu | | |
| Pápi Pippi býr á eini nekaraoyggj | | |
| Pápi Pippi eitur Eliesar | | |
| Pippi hevur átta nøvn | | |
| Pippi og pápi hennara eru líka sterk | | |
| Tá ið Annika verður stór, skal hon verða sjórænari | | |
| Pápi Pippi er ógvuliga tjúkkur | | |
| Tað er vetur | | |

**Set kross í rætta puntin**

| | ja | nei |
|---|---|---|
| Tað er summar | | |
| Pápi Pippi byggir sær ein nýggjan bát | | |
| Efraim, pápi Pippi, er í bláum buksum | | |
| Hann hevur yvirskegg | | |
| Pippi og pápi hennara fara at bólta rút | | |
| Pippi og pápi hennara leggja sjómann | | |
| Pippi væntar at vinna pápan at leggja sjómann, tá ið hon verður 10 ár | | |
| Urtagarðsgrindin er tað sama sum urtagarðsportrið | | |
| Mikkjalsmessa er 28. august | | |
| Astrid Lindgren hevur skrivað søguna um Pippi | | |

## Krossorð

**Les setningarnar og skriva svarið í krossorðagátuna á blaðsíðu 17**

Tvørturum →

1: Jólamaðurin hevur ein á bakinum

2: Epli, kjøt og ______

3: Hann er rundur, og tú kanst sparka hann

4: Hetta er eitt hús, har tú kanst gista

5: 21. og 13. bókstavur í bókstavaraðnum

6: Tú hevur tað á arminum, so veitst tú, hvussu nógv klokkan er

7: Um onkur dettur og fær ilt, so hoyrist ofta ______

8: Tú kanst koyra ein lykil í her

9: Tað er kalt, hvítt og smakkar væl

Niðureftir ↓

1: Navnið á einum drongi

2: Hon skínur um summarið

3: Hetta er ein ______________



10: Tú kanst eta ein gula______

11: Ein fuglur, sum sigur krá, krá

12: Tú kanst drekka tað.

13: Tað kann vera á einum træi, men tú kanst eisini lesa í tí

14: Seyðurin hevur _____, so hann ikki verður kaldur

15: Ikki til, men ____

16: Tað er stuttligt at fara í ánna at fanga ______

17: Soleiðis eitur Postverk Føroya nú

# Krossorð



**Eyka uppgáva**

Finn fjald orð og skriva tey á reglurnar. Orðini skulu lesast á rað. Byrja við K og enda við l.

| | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| K | r | a | b | b | i | l | u | r | g | a | f | f | i | l |